# Eftirlýsing – javnstøðupolitikk nú!

**Árið er 2009, og menn og kvinnur í Føroyum hava javnbjóðis rættindi og møguleikar til at gera seg galdandi í samfelagnum, og so er alt gott. Hetta er status í javnstøðumálum, spyrt tú landsstýrismannin í javnstøðumálum, Jóhan Dahl**

Herfyri fekk landsstýrismaðurin ákoyringar fyri bert at velja menn í nevndina fyri Atlantic Airways. Í hesum sambandi vísti landsstýrismaðurin á, at javnstøða er í nevndum annars, sum landsstýrismaðurin varðar av. Jú, tað er rætt, at sambært yvirlitinum, sum Jóhan á Dahl herfyri vísti fram, so sær kynsbýtið javnt út. Men tað áhugaverda er, at um starvsfólkaumboðini verða tikin úr yvirlitinum, so er myndin ein heilt onnur. Tí tá eru heili 62 % av nevndarumboðunum menn og bert 38 % kvinnur, og tað má vera hetta kynsbýtið, sum landsstýrismaðurin í javnstøðumálum hevur æruna av, tí tað er so ikki Jóhan Dahl, sum velur starvsfólkaumboð. Javnstøðupolitikkur? Hetta má vera eitt slag av pseudo javnstøðupolitikki.

Jú, tað er rætt, at kvinnur og menn í Føroyum formliga sæð hava javnbjóðis rættindi og møguleikar til at gera seg galdandi í samfelagnum. Men hóast hetta, so er tað ein sannroynd, at valdsbýtið í samfelagnum er alt annað enn javnt býtt millum kynini, sama um talan er um flogfelagið Atlantic Airways ella um tað snýr seg um vald yvirhøvur í politikki ella vinnulívi.

**Hvør liggur omaná?**

Um vit hyggja eftir nøkrum hagtølum fyri politiska umboðan, so eru bert 21,2 % av valdu løgtingslimum okkara kvinnur, og tá er enntá talan um eina munandi framgongd í mun til seinasta val. Tað skal tó viðmerkjast, at síðani sitandi landsstýrið varð skipað, er kvinnuliga umboðanin í Løgtinginum minkað niður í 15 %, og tað eru bert 2 flokkar á tingi, har kvinnur eru umboðaðar. So trøini vuksu ikki heilt inn í himmalin á hesum sinni. Um vit samanbera við støðuna í øðrum norðurlondum, so er samsvarandi tal í Grønlandi 39 %, í Danmark 39 %, í Svøriki 45 % og í Íslandi 40%. Í landsstýrinum eru tríggjar kvinnur og gevur hetta eina kvinnuliga umboðan á 33 %, og her skal viðmerkjast, at støðan áðrenn seinasta løgingsval var 0 %. Um vit samanbera okkum við nøkur av grannalondunum, so er samsvarandi tal í Danmark 42 %, í Svøriki áleið 50 %, í Íslandi 42 % og í Grønlandi 44 %.

Av okkara valdu kommunalpolitikarum eru 31 % kvinnur. Í Viðarreiðis kommunu er einki kvinnuligt umboð, og í mun til býtið av borgarstjórum, so sita menn í 24 av hesum sessum, meðan kvinnur einans eru borgarstjórar í 6 kommunum.

Um vit hyggja eftir valdsbýtinum í almennari leiðslu í Føroyum, so er støðan heldur ikki nóg góð. Kvinnur sita við leiðsluna í 19 av 76 almennum stovnum, tað er 25 %, og vit kunnu eisini nevna, at einans ein av 9 aðalstjórum er kvinna.

**Teir halda um pungin**

Um hugt verður eftir nøkrum tølum fyri privata vinnulívið, so eru t.d. 19,7 % av nevndarlimum í partafeløgum kvinnur. Bert 14, 2 % av skrásettum føroyskum fyritøkum hava kvinnuligan nevndarformann, og bert 20,1 % av skrásettum føroyskum fyritøkum hava eina kvinnu sum stjóra (2007-tøl).

Ójavna valdsbýtið hevur við sær, at menn hava størst ávirkan á, hvussu okkara samfelag skal skrúvast saman, hvussu raðfestast skal, og hvussi samfelagsressursurnar skulu nýtast til. Hetta sæst eisini aftur í privatlívinum, har tað í nógv størri mun eru kvinnurnar enn menninir, ið taka ábyrgd fyri heimi og børnum. Tað er í nógv størstan mun kvinnur, sum taka barnsburðarfarloyvi, sum arbeiða partstíð, og hava lægstu inntøkurnar. Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum leggja eisini beinleiðis upp til, at tað bara er kvinnan, ið tekur barnsburðarfarloyvi. Danskar kanningar vísa eisini, at menn hava væl størri uppsparing enn kvinnur. Og tað tykist ikki at vera nøkur orsøk til at halda, at støðan er øðrvísi í Føroyum, heldur tvørturímóti. So kvinnur: Tjekka líka eftirlønaruppsparingina!! Fáa tit tykkara part?

**Aftur í 50´ini**

Omanfyri nevndu tøl vísa, at kynsbýtið í flestu tættum av føroyska samfelagnum er langt frá nøktandi, og at Føroyar eru eftirbátar á javnstøðuøkinum, hóast omanfyri nevnda samanberandi kanning ikki er fullfíggjað. Men tað loyva vit só okkum at póstanda, og eisini vilja vit póstanda, at tað eru samfelagsligar forðingar, sum eru truplar hjá einum einstakum persóni at bróta niður. Tað er tískil tørvur á, at politisku myndugleikarnir sýna hesum áhuga. Áhugaverdi spurningurin er so, hvat skal gerast? Landsstýrismaðurin í javnstøðumálum úttalaði herfyri í fjølmiðlum, at hann ikki heldur, at javnstøða kann ella skal fremjast við lóggávu. Ja, so vita vit tað, men hetta førir so beinleiðis til spurningin: Hvat ætlar landsstýrismaðurin **so** at gera fyri at virka fyri einum javnari býti millum kynini?

Fyri vitjandi uttanífrá tykist ikki ivi vera um, at okkurt má gerast fyri at betra um støðuna. Hans Engell, fyrrverandi konservativur politikari í Danmark, vísti herfyri á, at vit eiga botnmett í norðurlondum fyri kvinnuliga politiska umboðan. Liza Marklund, rithøvundur, helt, at tað at koma til Føroyar var sum at koma aftur til 50´ini, tá javnstøðu umrøður. Ja, hetta vita vit sjálvsagt væl sjálvi, og vit vita eisini, at tað eru áleið 2000 kvinnur færri enn menn í Føroyum, og at vit hava fingið átalur frá CEDAW nevndini hjá ST fyri vána støðuna í Føroyum. Men tað hevur so ongantíð fingið nakran politikara upp úr stólinum við ætlanum um at gera nakað við tað. Lága politiska raðfestingin av arbeiðinum við at fremja javnstøðu í Føroyum sæst eisini aftur við sera lágum játtanum til Javnstøðunevndina og Demokratiu.

**Krúnan á verkinum**

Herfyri í sambandi við fólkaatkvøðu um javnstøðu millum danskar prinsessur og prinsar í kongaríkinum løgdu vit til merkis, at Sambandsflokkurin vísti ein slíkan eldhuga fyri javnstøðumálum, sum vit ikki hava sæð áður. Men tað sær ikki út til, at javnstøðumál hjá Sambandsflokkinum fevna um føroysk gentu- og dreingjabørn. Stór javnstøðuráðstevna hevur júst verið í Føroyum, og tey, sum væntaðu sær nakra ítøkiliga ætlan frá løgmanni ella landsstýrismanninum í javnstøðumálum í sambandi við røður teirra á ráðstevnuni vórðu stórliga vónbrotin – eingin fráboðan um nakran javnstøðupolitikk. Hetta má gerast betur! Vit eftirlýsa hervið ein javnstøðupolitikk. Vit bíða, Jóhan Dahl...

*Eva H. Bennicke,*
*Jenny Kingbo,*
*Margit Stórá,*
*Katrin Gaard,*
*Óluva Zachariasen,*
*Ann Damgaard,*
*Doris Bjarkhamar og*
*Hallbera Fríða West*

# Grønlendska undirgrundin eingin gáva

**ZAKARIAS WANG**



Jútlandsposturin hevur veitt innivist fyri eini kronikk eftir Ole T. Krogsgaard í Hellerup, nú tað gleðiliga hendi, at grønlendingar fingu eina sjálvstýrislóg.

Tað hann førir fram, er at grønlendska sjálvstýrislógin og serliga ásetingin um, at Grønland sjálvt skal eiga sína undirgrund, ber við sær at Danmark er fyri stórum missi.

Hetta er fullkomuliga burturvið!

Danmark er ein partur av tí framkomna heiminum, har ein grundleggjandi áseting er, at ognarrætturin er friðhalgaður. Brýtur nakar hesa reglu, hevur tað álvarsligar avleiðingar.

Tá Krogsgaard nú førir fram, at tað er Danmark, sum er rætti eigarin av grønlendsku undirgrundini, so má hann eins væl og Anker Jørgensen vera førur fyri at greiða frá, nær ið Danmark er vorðin eigari av hesari undirgrund.

Hesa frágreiðing hava vit ongantíð sæð, og sum kunnugt hava danskar stjórnir síðan Anker Jørgensen stýrdi slept hesum uppáhaldi. Men tíverri hava stjórnirnar ongantíð givið nakra veruliga frágreiðing um, hví tær eru komnar á eina rættari leið, og tí ber tað til hjá Jútlandspostinum og Krogsgaard at halda fram við síni villleiðing av almenninginum.

Ein og hvør við einum lítlum veti av kunnleika til søgugongdina veit jú, at Grønland ikki altíð hevur verið saman við Danmark. Tann sum ivast í hesum veruleika, kann fara á bókasavnið og lesa tann dóm, sum 5. apríl 1933 varð sagdur í altjóðadómstólinum í Haag. Har segði ein meiriluti, at Grønland fram til 14 januar 1814 hevði verið ein partur av kongsríkinum Noreg. Ein av tí meiriluta, sum hetta segði, var tann dómari, sum danska stjórnin hevði útnevnt fyri at verja sína søk.

Noreg – og sostatt Grønland – vóru á ongan hátt ein partur av Danmarkar ríki um hetta mundið. Viðurskiftini millum kongsríkið Noreg og kongsríkið Danmørk vóru ásett við tí altjóða sáttmála, sum varð gjørdur teirra millum í Bjørgvin tann 29. august 1450. Har varð ásett, at borgararnir í hvørjum ríki sær skuldu stýra sínum egnu viðurskiftum. Tí var púra óneyðugt at siga at teir eisini skuldu avgera hvussu undirgrundin skuldi nýtast! Sáttmálin ásetti eisini, at ríkini skuldu hava kong í felag, og hann skuldu tey bæði velja. Tey skuldu eisini í felag taka avgerðir um frið og kríggj.

Tann 14. januar 1814 minkaði Norges ríki, men framvegis vóru Grønland, Føroyar og Ísland sáttmálapartur við Danmørk undir 1450-sáttmálanum við somu treytum sum higartil.

Fyri samveldisstjórnina hevur tað ikki gingið serliga væl at hildið sáttmálan, sum hon hevur verið bundin av. Sáttmálin er tó ikki uppsagdur, og tað, sum nú er hent Grønlandi viðvíkjandi, vísir, at trongskygd donsk nationalisma dvínur fyri veruleikanum.

Hetta er at fegnast um, men hví ikki halda fram eftir somu kós?

Tey álvarsamastu brotini, sum eru framd móti ásetingunum í bjørgvinarsáttmálanum, eru av økonomiskum slag. Tá sáttmálin ásetur, at hvør partur skal stýra sínum egnu viðurskiftum, er tað ólógligt, at annar parturin skal flyta pengar til hin partin. Tað var tí brot á sáttmálan, at Føroyar til 1877 og Grønland til 1950 fluttu pengar til Danmarkar, og somuleiðis er tað ólógligt, at Danmørk nú flytir pengar til Føroya og Grønlands.

Tá tað ikki eru borgararnir í einum stati, sum sjálvir gjalda tær almennu útreiðslurnar, hvussu kann nakar so halda, at teir sjálvir ráða yvir egnum viðurskiftum, og sum teir skulu sambært sáttmálan?

Tað eru munandi upphæddir, sum Danmørk stuðlar teir føroysku og grønlendsku skattgjaldararnar við. Verður alt tikið við, er stuðulin til Føroya um eina milliard og tann til Grønlands um tríggjar milliardir – um árið! Hetta verður goldið hóast danski staturin hevur ilt við at halda tær skyldur, sum hann hevur átikið sær mótvegis sínum egnu borgarum, sum tey ið kenna nakað til viðurskiftini á ríkissjúkrahúsinum kunnu vitna um.

Almenna grundgevingin fyri at flyta pening til hin sáttmálapartin er tann, at har er slík fátækt, at tey, sum har búgva, líðu hungur og hall, um tey ikki fingu pengar uttanifrá. Heilt uttan fyrilit atkvøða allir fólkatingsmenn fyri hesari játtan uttan yvirhøvur at kanna eftir, um nakað er í hesum upphæddini.

Men tað er tað ikki!

Teir pengar, sum danskir skattgjaldarar verða noyddir til at gjalda til Føroya og Grønlands, hjálpa ikki teimum fátæku í hesum ríki. Pengarnir hjálpa heldur ikki samfelagnum, tí teir gera almiklan skaða, og tað er nakað, sum ein og hvør, sum hevur eitt lítið vet av kunnleika til økonomisk viðurskifti og altjóða samskifti kann vátta.

Tí hvussu vóru viðurskiftini, áðrenn danska tjóðin av sínum óhygnu stjórnmálamonnum varð áløgd hesa byrðu?

Tá vóru tað útflutningsinntøkurnar, sum guldu fyri útreiðslurnar av innflutninginum. Um so var at hall eitt ár, so var neyðugt at gera tiltøk fyri at vaksa um útflutningin ella minka um innflutningin. Var hin vegin avlop, so bar til at taka sær av løttum, við tí úrsliti, at avlopið minkaði og at enda hvarv. Hetta var tann gongdin, sum David Hume greiddi frá í 1752, og sum allir skilagóðir økonomar síðani hava tikið undir við.

Men so kom danski staturin við pengum. Nú lá væl fyri at taka sær av løttum. Pengarnir komu til teir sum stýrdu, og hesir stjórnmálamenn kundu gjara út uttan at misnøgdir skattgjaldarar áløgdu teimum at brúka pengarnar við skili.

Úrslitið hevur eisini verið heilt eftir bókini. Framleiðnið í vinnulívinum hevur verið lítið, og fleiri pengar, ið komnir eru út Danmørk, verri hevur gingist.

Tað rætta at gera fyri donsku fólkatingsmenninar er tí, tá ið teir nú skulu fara undir at gera nýggja fíggarlóg fyri 2010, at nýta høvi til at seta veitingarnar til Føroya og Grønlands niður á 0 kr.

Tað er greitt, at teir føroysku og grønlendsku stjórnmálamenninir, sum higartil hava livað í pannukøkuhúsunum, sum donsku skattgjaldararnir hava goldið, fara at verða misnøgdir. Men tað hava teir onga orsøk til at verða. Veitingarnar, teir higartil hava fingið, eru ólógligar av tí at tær eru í stríð við tann sambandssáttmála sum danir eins væl og vit liva undir, og harumframt eru tær hvønn dag oyðileggjandi fyri økonomiska lívið bæði í Føroyum og í Grønlandi.

Tað er eitt rímiligt krav til stjórnmálamenn, at teir í virki sínum virða lógir og reglur, og at teir royna at hava vanligt fíggjarskil. Hetta er eisini galdandi fyri føroyskar og grønlendskar stjórnmálamenn. Tí mugu egináhugamál teirra dvína fyri tí sum er rætt.

At hetta stig ikki verður tikið av danska fólkatinginum er tað veruliga brotsverkið í hesum viðurskiftum. Men tað sigur hvørki Jútlandsposturin ella Ole T. Krogsgaard nakað um.